# Landsantikvarur í leysari luft

**Óvist er, um setanin av landsantikvari stendur við. Løgmaður bíðaði í gjár eftir Høgna Hoydal, sum var í flogfarinum á veg til Føroya í gjár, men hann útilokar ikki, at setananin av Steffen Stumman Hansen verður ógildað. Um so er, fær tað fíggjarliga avleiðingar**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*

Setanin av landsantikvari fekk politiskar avleiðingar. Annlis Bjarkhamar er ikki longur landsstýriskvinna. Men maðurin alt rokið stóð um, Steffen Stumman Hansen, ið varð tikin fram um Símun V. Arge, er framvegis útnevndur landsantikvarur næstu fimm árini.

Tað hóvar ikki Magistarafelag Føroya, sum er felagið hjá Símun V. Arge. Felagið ger greitt, at tað stendur við sítt krav um, at setanin av landsantikvari verður ógildað. Felagið byggir kravið á, at tað ikki er farið rætt fram, tá nýggjur landsantikvarur varð settur.

– Frá felagsins síðu er tað umráðandi, at aðalspurningurin í hesum máli ikki druknar í tí politiska meldrinum við tí nýíkomnu støðuni. Hesin aðalspurningur er, at setanini av nýggjum landsantikvari verður annullerað, sigur Magistarafelagið í tíðindaskrivi.



*Magistarafelagið krevur framvegis, at setanin av landsantikvari verður ógildað. Onki forðar mær í at ógilda setanina av landsantikvari, men tað fær nakrar fíggjarligar avleiðingar, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.*

### Stendur við enn

Í løtuni umsitur Anfinn Kallsberg løgmaður formliga mentamál, og tað er sostatt bara hann, sum kann ógilda avgerðina hjá Annlis Bjarkhamar.

Spurningurin er, um setanin av Steffen Stumman Hansen stendur við. Men Anfinn Kallsberg fæst ikki at svara í løtuni, um nýggi landsantikvarurin verður sitandi.

– Sjálvandi stendur setanin við. Landsstýrismaðurin hevur sett hann í starv og hevur sent honum setanarskriv. Formliga er avgerðin framd umsitingarliga. So leingi tann avgerðin stendur við, er Steffen Stumman Hansen landsantikvarur. Um tað verður broytt, veit eg ikki enn, tí tað er ikki viðgjørt, sigur Anfinn Kallsberg.

Tá Sosialurin tosað við løgmann fyrrapartin mikudagin bíðaði hann eftir, at Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, kom aftur av uttanlandsferð. Løgmaður vil ikki gera nakað ella geva nakra ítøkiliga viðmerking, fyrr enn teir báðir hava tosað saman. Og tað er greitt, at teir høvdu nógv at tosa um.

### Broyting kostar

Tað skilst kortini á lagnum, at enn eru ikki allar súður syftar, hóast fráfarna landsstýriskvinnan hevur gjørt tað truplari at broyta avgerðina.

Beint eftir, at løgmaður boðaði Annlis Bjarkhamar frá, at hann fór at kanna málið, tí so nógvir ivaspurningar vóru reistir, staðfesti hon nevniliga avgerðina við at senda Steffen Stumman Hansen setanarbrævið. Hetta er ein høvuðsorsøk til, at álitið millum hennara og løgman reyk, sigur Anfinn Kallsberg. Men tað forðar honum kortini ikki í at ógilda avgerðina.

– Tað avbyrgir meg ikki frá at gera tað, men tað hevur nakrar fíggjarligar avleiðingar. Tú kanst altíð seta fólk úr starvi, men eru tey sett fyri eitt ávíst tíðarskeið, so kanst tú ikki uttan víðari taka tað aftur. Tá hevur viðkomandi nøkur rættarkrøv, og tað mugu vit taka við, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður.

# Løgmaður verjir samgonguna

**Hørðu ábreiðslurnar frá Tjóðveldisflokkinum fær ikki Anfinn Kallsberg at siga samgongusamstarvið upp. Hann vísir aftur, at uppsøgnin er eitt royktám og heldur als ikki, at uppsøgnin av Annlis Bjarkhamar er eitt samgongumál. Hann gjørdi bert sína skyldu sum løgmaður, sigur hann**

UPPSØGN
*Ingi Rasmussen*

Brotasjógvar skola enn einaferð inn yvir Tinganes. Avgerðin at siga Annlis Bjarkhamar frá sum landsstýriskvinnu fekk Høgna Hoydal varaløgmann at taka so harðliga til orðanna, at fleiri eygleiðarar vænta, at nú rýkur samgongan við briminum.

Høgni Hoydal segði avgerðina hjá løgmanni at vera tað mest óanstendiga, hann hevði upplivað. Men tað fær ikki Anfinn Kallsberg at blikna. Løgmaður vónar ikki, at málið førir til, at Tjóðveldisflokkurin sigur samstarvið upp.

– Hetta er eitt mál, har løgmaður hevur ta funktión at hava eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrismonnum. Og tað er í tí samanhangi, at avgerðin er tikin. Hetta er yvirhøvur ikki eitt samgongumál, sum fólk hava hug at gera tað til, sigur løgmaður.

Nógv hevur verið gitt um, hví løgmaður segði Annlis úr starvinum. Róð hevur verið framundir, at hetta er eitt takk fyri seinast, tá Jørgen Niclasen mátti lúta, og í øðrum lagi verður gitt, at løgmaður roynir at seta royktám út, nú Fiskimálaráðið aftur er komið í trupulleikar við fiskiloyvum.

– Tað er nakað forferdiligt slutur, er løgmaður skjótur og knappur at svara.

– Hetta málið um setan av landsantikvari hevur verið frammi í fleiri vikur, og tað er ikki av tilvild, at tað hevur stungið seg upp. Løgmaður hevur als ongan aktivan leiklut havt. Tað er reist í pressuni og í fyrispurningum á løgtingi, og tá tað so íkemur, er tað skyldan hjá løgmanni at hyggja eftir, um alt er í lagi. Og mín niðurstøða er út frá einari heildarmeting, at hetta málið als ikki er handfarið nøktandi, sigur løgmaður.

Hann dylir ikki fyri, at orsøkin til, at hann segði Annlis Bjarkhamar úr starvi er, at hann ikki longur hevur álit á henni, og so hevur hann ikki so nógvar møguleikar.

– At eg skal royna at kamuflera nakað annað, er fullkomiliga burturvið. Hetta málið hevur onki at gera við nakað annað mál. Um mín niðustøða hevur við sær, at samgongan slitnar, veit eg ikki. Men tað kann ikki halda løgmanni aftur í at gera tað, sum hann metir er tað rætta fyri at halda saman upp á skipanina, sigur løgmaður.

Í brævinum til Annlis ger løgmaður greitt, at hann ráddi henni frá at fara inn í viðgerðina. Og tá hon kortini gjørdi tað, og enntá staðfesti sína avgerð, eftir at hann fór at kanna málið, hevði hann onki val longur.

Álitið varð fokið.



# Tjóðpallurin fer av bakkastokki



*Sjónleikarar í Føroyum fáa eftir ætlan ein tjóðpall at liggja, standa og leika á 1. januar 2004. Her eru tað Katarina Nolsøe og Hans Tórgarð á skráu brettunum*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Tjóðpallur Føroya skal setast á stovn 1. januar 2004. Sostatt fáa Føroyar egnan tjóðpall, har leiklistafólk hava sítt dagliga virki og spæla klassiskan og nútíðar sjónleik á høgum støði. Samstundis verður áhugaleiklistin og yrkisleiklistin í størri mun skild sundur.**

LEIKLIST
*Ingi Rasmussen*

Tjóðpallur Føroya er flaggskipið, sum nú fer av bakkastokki.

Soleiðis sigur Listafólkasamband Føroya, nú Tjóðpallur Føroya loksins er lagdur fyri løgtingið.

Nakað av tí síðsta, sum Annlis Bjarkhamar fekk frá hondini, áðrenn hon varð koyrd frá sum landsstýriskvinna, var at leggja uppskot til lóg fyri løgtingið um stovnan av Tjóðpalli Føroya. Hetta er ein dreymur, sum hevur livað millum leiklistafólk í áravís, ið nú verður loystur úr lagdi.

Ætlanin er sambært uppskotinum, at Tjóðpallur Føroya alment verður settur á stovn 1. januar 2004. Tjóðpallurin verður ein sjálvstøðugur stovnur. Ein landsstovnur, sum í listaliga virki sínum er óheftur av politiska myndugleikanum. Tað er landsstýrismaðurin við mentamálum, sum fær heimild at seta á stovn Tjóðpall Føroya. Hann skal eisini velja eitt leiklistaráð við 7 limum, ið umboða ymiskar áhugabólkar við tilknýti til leiklistina.

### Eitt yrkisleikhús

Arbeitt hevur verið leingi við at seta ein tjóðpall á stovn. Nú er tíðin búgvin. Málið við lógini er, at Føroyar fáa egnan tjóðpall, har leiklistafólk hava sítt dagliga virki og bæði klassiskur, nútíðar, føroyskur og týddur dramatikkur verður sýndur.

Síðan 1989 hava vit havt Leikpall Føroya, sum hevur til endamáls at fremja yrkis- og áhugaleiklist. Leikpallur Føroya hevur mest virkað sum ein skipan, ið hevur umsitið almenna stuðulin til leiklistina.

Tjóðpallur Føroya er eitt yrkisleikhús av slíkum slagi, sum vit ikki hava havt í Føroyum áður. Hann skal virka sum ein yrkisleikpallur við fastløntum starvsfólki. Roknað verður við, at leikararnir og onnur listalig starvsfólk verða sáttmálasett í tíðaravmarkað størv. Harafturat má roknast við, at Tjóðpallur Føroya fer at sáttmálaseta leikarar frá leiki til leik. Eisini kann roknast við, at tjóðpallurin fer at knýta áhugaleikarar til partar av sínum framførslum.

### Skilt sundur

Ein stjóri skal setast fyri Tjóðpall Føroya. Hann skal leggja eina heildarfíggjarætlan og virksemisætlan fyri leiklistaráðið at góðkenna. Leiklistaráðið skal sostatt fylgja við virkseminum, uttan tó at leggja seg út í tað listaliga innihaldið. Tey skulu vera kjakfólk stjórans, ein hugskotsgrunnur. Harafturat skulu tey vera eitt sambindingarlið til áhugaleiklistina.

Sum nú er, er játtanin á løgtingsins fíggjarlóg til leiklistina savnað í eina kontu til Leikpall Føroya, sum umsitur og býtir játtanina. Nú verður játtanin býtt sundur í tríggjar kontur: Tjóðpall Føroya, stuðul áhugaleiklist og stuðul til yrkisleiklist. Soleiðis verður leiklistaligt virksemi skilt sundur og ábyrgdin verður greiðari.

### Tjóðleikhús bíðar

Hóast Tjóðpallur Føroya ætlandi verður settur á stovn 1. januar 2004, so verður neyvan nakað tjóðleikhús bygt í bræði. Fyrstu tíðina kemur yrkisleiklistin at húsast sum nú, men arbeiðast skal fram ímóti, at Tjóðpallur Føroya fær hóskandi høli í høvuðsstaðnum. Tjóðpallurin skal kortini ferðast kring landið við leikum og øðrum virksemi.

Lógaruppskotið hevur ongan eyka kostnað við sær í fyrstu atløgu, men skal endamálið við lógini røkkast, er neyðugt, at játtanin á fíggjarlógini hækkar komandi árini, sigur Annlis Bjarkhamar, fyrrverandi landsstýriskvinna í viðmerking til lógina. Tað verður upp til hennara eftirmann at arbeiða fyri.

# Innlit í fíggjareftirlit verður eftirlýst

**Føroyingar fáa ikki at vita, hvat fíggjareftirlitið heldur um støðuna í føroysku peningastovnunum. Tað hevur fingið fólkatingsmannin Tórbjørn Jacobsen at spyrja danska búskaparmálaráðharran, hvussu hann ætlar at tryggja føroyingum innlit**

FÍGGJAREFTIRLIT
*Ingi Rasmussen*

Føroyingar hava ikki innlit í, hvat danska fíggjareftirlitið heldur um støðuna í føroysku peningastovnunum.

Tað var hildið at vera ein av mongum orsøkum til, at føroyska samfelagið fór av knóranum í nítiárunum. Ongin í Føroyum visti veruliga, hvussu galið tað stóð til í bankunum, fyrr enn ov seint var.

Í søguligu semjuni um m.a. bankamálið í 1998 var hendan sannroynd ásannað. Tí varð avrátt millum donsku stjórnina og landsstýrið, at ábyrgdin fyri fíggjarpolitikkin liggur í Føroyum. Samstundis varð sagt, at danski búakaparmálaráðharrin skal kunna landsstýrismannin við fíggjarmálum um støðuna í fíggjarheiminum.

Avtalan varð tulkað soleiðis í Føroyum, at føroyskir myndugleikar nú fóru at fáa somu kunning um støðuna í føroysku peningastovnunum sum danskir myndugleikar. Men tað er ikki støðan, hóast næstan fimm ár eru liðin síðan avtaluna.

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur gjørt greitt, at danska fíggjareftirlitið fleiri ferðir hevur givið føroyingum tey greiðu boðini, at eftirlitið ikki hevur heimild at kunna Føroya landsstýri um gongdina í føroysku peningastovununum.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann fleiri ferðir hevur biðið um at fingið upplýsingarnar, men tað hevur verið ógjørligt.

– Sannleikin er tíverri, at eg sum landsstýrismaður við fíggjarmálum ikki fái fult innlit í eina møguliga bankakreppu, fyrr enn tað er ov seint. Ella kanska tá lykilin er snaraður. Í so máta er ikki nógv broytt síðan 1992, sigur Karsten Hansen.

Hesa støðuna, at føroyingar ikki kunnu fáa innlit í støðuna í sínum egnu peningastovunum, kallar Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmaður absurda. Hann heldur tað vera eitt greitt brot á ætlanina við avtaluni frá juni í 1998.

– Nú fíggjareftirlitið eftir øllum at døma vísir til ásetingarnar í lógini, tá eftirlitið noktar at geva føroyskum myndugleikum sínar frágreiðingar, má lógin broytast. Og tað má vera ábyrgdin hjá búskaparmálaráðharranum at taka stig til, at tað hendir, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann hevur tískil sett Bendt Bendtsen búskaparmálaráðharra ein fyrispurning, sum skal svarast í Fólkatinginum. Tórbjørn Jacobsen spyr, hvørji stig hann hevur hugsað sær at taka, soleiðis at føroyskir myndugleikar fáa fult innlit í frágreiðingarnar hjá fíggjareftirlitinum um støðuna í føroyskum peningastovnunum.